# iðlahúsið lurin



*Vágsbotnur fyri góðari øld síðani*



*Snorri Brend, blaðmaður: Nú havi eg bert verið her í einar tríggjar tímar, men mær dámar væl. Eg eri spentur upp á at sleppa at arbeiða á eini felagsredaktión. Men um eg kundi valt, so hevði eg valt eitt kontór fyri meg sjálvan.*

*Eydna Skaale, blaðkvinna: Fínasta slag, men mann skal venja seg við, at øll sita saman.*

*Jákup Mørk, blaðmaður: Super, men tað er farligt at vera so tætt at matstovuumhvørvinum.*

*Tóki Højgaard, fíggjarleiðari: Her liggur væl fyri. Tað er lætt at koma til, og hølisumstøðurnar eru góðar. Tað er lættari at fáa fatur á fólki, og harumframt er tað sera gjøgnumskygt í bygninginum.*

*Terji Nielsen, blaðmaður: Eg eigi nógv fótaspor her niðri á leiðini. Sum tólv ára gamal var eg støðmaður og agnseljari við bensinpumpuna í Vágsbotni. So her fari eg at kenna meg aftur.*

*Edvard Joensen, blaðmaður: Mær dámar ikki at arbeiða í einum opnum kontórlandslagi. Men her er nógv betri pláss í nýggju hølunum. Í sambandi við flyting og tílíkt, so haldi eg, at tað var skeivt at leggja lokalredaktiónirnar niður.*

*Magnus Gunnarson, blaðmaður: Mær dámar væl. Tað er lættari at samskifta við starvsfelagarnar og við blað-redaktiónina.*

*Simona Weihe, tekniska deild: Her eru góðar arbeiðsumstøður og hugnaligt umhvørvi.*

*Ann Christiansen, bókhald: Tað hevur gingist væl higartil, og okkum dámar væl at vera í Vágsbotni mitt í býnum.*

*Jens Kr. Vang, myndamaður: Nú eri eg nógv tættari upp á tað heila, og tað er skjótari at koyra runt og taka myndir.*



***Gott sýni er inn í kontórið hjá Jonhard Hammer, marknaðarleiðara á Sosialinum***

*Eirikur Lindenskov, blaðstjóri: Hetta er fantastiskt. Vit hava arbeitt við at fyrireika flytingina í fýra mánaðir, og endaliga úrslitið livir avgjørt upp til vónirnar. Her niðri í Vágsbotni angar av søgu og gomlu Havnini. Og so er tað tann snøgga, nýggja adressan: Tórsgøta 1, 100 Tórshavn. Her verður hugaligari at arbeiða, og tað vænti eg kemur at síggjast aftur á blaðnum.*